hesum óstýriligu ribbaldum, sum illa dugdu at skina á, hvat var loyvt og ikki loyvt. Hugsi nógvir bakkadreingir kenna seg aftur í hesum villmannalívi á tí heilaga slottinum Kolbrúnni, sum var fyri guðar, sjómenn, hampafólk, treiskar og tóvuttar smádreingir.

**Kaiin og russararnir**

Tað var ein dekans munur millum Kolbrúnna og kaiina. Tað komu nógv stór før til bygdina um hetta mundi og løgdu upp kol og salt við Stórubrúgv. Kain var størri í vav, men ikki so høg upp á fót sum Stórabrúgv, men ikki at forgloyma tey stóru russisku móðirskipini, ið løgdu at her, t. d. Tobruk og Narvik sum mundu vera eini 10.000 tons til støddar. Ikki so sjáldan háluðu russar vatn við kaina. Hetta vór minni før. Onkrir av teimum itu Groznjeft og Aznjeft. Russarnir vóru blíðir - kino dobra - filmur góður, dugdu vit at siga, og ikki so sjaldan varð farið um borð at hyggja at filmum. Meðan, antin tað var Tobruk ella Narvik, ið lógu at, varð hvítt lørift hongt upp á ein av ljóssteyrunum á kaini, og filmstólið stóð innan fyri eitt kúgveygað á damparanum, snurraði, og bleiktraði, meðan ein fjøld av fólki stóð um kvøldarnar og hugdu at. Hetta var forkunnugt filmslív, men ólukkutíð kom danska »øvrigheitin« og forpurraði filmsýningini. Sjálvur tann grái Lundin hjá tí donsku sjóverjuni kom upp í leikin og steðgaði hesari livandi gongd. Hví hetta var so, fekk eingin at vita um. Sakleysir russarar, óskyldug bygdafólk - vaksin, børn og ungdómar hugnaðu sær á kaini hesar dagar. Hetta var undir tí kalda krígnum, sum kanska eisini skuldu seta síni fingramerki á góðvarnar sjómenn og góðvarið bygdarfólk, sum bara høvdu gott at bera hvørt øðrum. Russararnir spældu onkran fótbóltdyst ímóti fuglfirðingum á kaini, sum tá var fótbóltsvøllur í bygdini. Eisini sóu vit teir spæla flogbólt sínámillum. Okkurt skemtiligt stakk seg upp. Harry hjá Martini á Støðini peikaði á kaifútan og læt í honum: Sjumarega, meðan russar hoyrdu. Hetta var bara gjørt í spølni. Millum russar fekk hann navnið Sjumarega, sum teir hildu vera hansara kristna navn.

Signar, sum gekk við einum rivnum keppi ein dag, fekk keppin seymaðan aftur av einum konufólki, sum sigldi við einum av teimum russisku vatnbátunum. Hetta var so sera snøgt gjørt, at tað kundi verið sjálv sjúkmamma hansara, sum hevði seymað keppin aftur.

Myndin av fimleikaliðnum hjá Petur Sigurd Rasmussen, ið var vikarur við Fuglafjarðar skúla, sum er frá 1955/56, er eisini ein mynd av villmonnunum av Bakkanum, sum her standa so ernir í fimleikaklæðum, sum mammurnar seymaðu úr mjølposum úr Tip-Top eins og teltini vórðu tað. Myndin er frá einum fimleikatíma, sum vit høvdu norðuri á kaiini. Vit gingu skrúðgongu gjøgnum bygdina og vístu okkum, meðan mammurnar stóðu og hugdu at avrikinum úr mjølposaplagginum, sum vit ekkaleysur og stoltir fóru í uttan knarr, fjas ella háva. Hetta var tann tíðin, tá ið mangt plaggið varð virkað burtur úr ongum, og sigast kann, at tey flestu vóru nøgdsom glað og fyri tað, tey fingu.

Hetta var bara nakað, sum rann fram fyri meg, nú Signar fer um tey seksti. Hjartaliga til lukku við tí runda árinum, og takk fyri løturnar á Bakkanum fyri 50 árum síðani. Tað hendi jú tað, at Signar flutti heim í Gjógvará at búgva uml. tíggju ára gamal. Tá bleivst tú gjógvarádrongur. Hugsi ikki tað var eins spennandi, sum at vera bakkadrongur. Tangotrinini vóru eitt sindur annarleiðis heimi í Gjógvará, men hóast tað komst tú fram í lívinum og fekst sæti millum hægstu sessir landsins. Hetta hevur verið eitt gott tangolag. Tað lati eg liggja, men smádreingjaløturnar vóru stuttligar, spennandi, og mikil skaldskapur var í hesum óvitadøgum.

**Frits Johannesen**

# Frensur á posthúsinum



Hesin grá/hvíti frensurin hevur hildið til á Posthúsinum á Óðinshædd í Havn síðan mánamorgunin 7. februar. Eigarin biðist vinarliga ringja á tel. 212136.

Fróðskaparsetur Føroya, Náttúruvísindadeildin:

# Ellivu KT-frøðingar fingið prógv

**Fríggjadagin 4. februar 2005 fingu 11 nýggir KT-frøðingar prógv á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum.**

KT-frøðingarnir hava tikið eina bacelorútbúgving í kunningartøkni, sum Náttúruvísindadeildin á Fróðskaparsetrinum bjóðaði út í 2002.

Stórur partur av útbúgvingini er farin fram við verkætlanararbeiði og sjálvlestri.



*Aftara rað f.v.: Marjus Østerø Nielsen, Bárður Viðberg Dam, Eyðun Nielsen, Edvard í Skorini Joensen, Petur Arni Mortensen og Óli Gardshodn.*
*Fremra rað f.v.: Eyðun Lamhauge, Hallur Hjelm, Brian Sjúrðarson, Gert Joensen og Tórður Kruse Mørkøre*

*Mynd: Fróðskaparsetur Føroya*

Faroe Dive, Klaksvík:

# Tríggir kavarar fingið prógv

Sunnudagin 6. februar 2005 fingu tríggir ungir menn prógv sum kavarar í Klaksvík.

Teir hava seinastu vikurnar staðið royndir innan kavara- teori og venjing í svimjuhøll og venjing í sjónum.

Janus Joensen, sum eigur og rekur fyritøkuna Faroe Dive í Klaksvík, var instruktørur.

Næmingarnir hava allir verið so væl nøgdir og hildu tað vera so spennandi at kava, at teir hava ætlanir um at útbúgva seg enn betri innan kaving.



*Luttakararnir f.v.: Janus Joensen, instruktør, Klaksvík, Jón Ingi Johansen, Klaksvík, Claus Schram, Klaksvík, og Hans í Gerðinum, Vestmanna*

Mannbjørn Tausen, Vágur:

# 25 ára starvsdag hjá Suðuroyar Sparikassa

Tann 4. februar 1980 byrjaði Mannbjørn Tausen sum bókhaldari í Suðuroyar Sparikassa, og hevur hann í dag verið í starvi sum bókhaldari/roknskaparleiðari í Suðuroyar Sparikassa í 25 ára.

Mannbjørn tók studentsprógv í Hoydølum í 1975. Skúlaárið 1975/76 var hann læraravikarur í Vági. Í 1976 fór Mannbjørn at arbeiða hjá Grannskoðaravirkinum C.V. Weihe, har hann fekk sína útbúgving innan bókhald og roknskap.

Mannbjørn hevur annars verið sera virkin innan ítróttin í Vági, bæði sum leikari á 1. deild hjá VB, og sum formaður hjá Vágs Bóltfelag. Eitt tíðarskeið var hann eisini virkin innan politikk, og var hann borgarstjóri í Vágs Kommunu fyrst í 1990unum.



*Mannbjørn Tausen fekk ein málning av Øssuri Mohr í gávu frá Suðuroyar Sparikassa*